Tjaldrið vinnur hvørja ferð

5–mannafør dreingir: Sjálvt um talan so at siga er um nýggja manning, so megnaði dreingjabáturin hjá NSÍ at halda fram, har hann slepti í fjør

Í fjør var báturin nýggjur, og tá vundu teir burturúr øllum hinum í øllum kappingunum. Síðani tá er mest sum alt fólkið skift út. Bátsformaðurin er tann einasti frá manningini í fjør, sum framvegis eru umborð. Hinir eru farnir umborð á 6–mannafarið Sølmund. Afturfyri er stýrimaðurin, sum í fjør var umborð á Sølmundi, nú komin umborð á Tjaldrið. Ein av hinum rógvarunum var í fjør við gamla Tjaldrinum, sum nú eitur Spógvin. Hinir fýra eru allir spildurnýggir rógvarar.

Róðursmaðurin er fimtan ára gamal, lærmenninir báðir eru seytjan ár, og hinir fýra eru sekstan ára gamlir. Men tað gongur framvegis sum smurt. Tjaldrið vann fyri góðari viku síðani á Strondum, og á norðoyarstevnu stóð eingin teimum kurl.

Hóast Tjaldrið bara er gott og væl eitt ára gamalt, so vóru fleiri bátar, ið eru uppaftur yngri. Til hetta kappingarárið hevur Havnar Róðrarfelag fingið Sílið, klaksvíkingar hava fingið Fípuna Føgru, og á Argjum hava teir fingið ein nýggjan Blik.

Ofta vísir tað seg, at tað er eitt sindur av fjáltri á í fyrsta róðrinum í fyrstu FM kappingini. Soleiðis tóktist tað eisini vera hesa ferð. Eftir tíggju sekund skeyt dómarin róðurin av, tí Erla Kongsdóttir hekk eftir í fasta startinum.

Seinnu ferðina gekk upp á stás. Frúgvin, Sílið og Fípan Fagra fingu góðan start saman við Tjaldrinum. Tá málið var hálv rógvið, var Tjaldrið komið so at siga upp á pláss, og so skalaði eingin teimum.

– Tað var ikki so langt ímillum okkum og Blik, sum endaði næstfremstur. Hann var eystastur og róði undir Kósabrúnni. Vit vóru nummar átta av ellivu bátum. Teir á toftuni hildu seg síggja, at vit vóru fremstir, og á málinum vísti munurin seg at vera ein bátslongd. Tað var eitt sindur minni, enn munurin var, tá vit kappaðust á Strondum, staðfestir Eyðfinn Bjarnastein, sum er bátsformaður á Tjaldrinum. Hann heldur, at tað verður havt í huga, at fýra av teimum seks við árarnar organtíð áður høvdu luttikið í FM kappróðri, so kundu teir ikki annað enn vera nøgdir.

Stýrimaður umborð á Tjaldrinum er Bent Tommy Vang. Á lærinum eru Eyðfinn Bjarnastein og Eyðun Hansen. Í rúminum eru Janus Olsen og Jonleif Davidsen, og á toftubekki eru Oddur Klein og Jov Olsen.

Tað snýr seg um bøkur og kappróður

6–mannafør kvinnur: Helvtin av manningini á Páll Fanga gongur í hesum døgum til prøvtøku fleiri ferðir um vikuna

Fyrr hevur verið sagt, at kappróðrarárið – sammett við árini hjá flestu øðrum ítróttargreinum – er stutt. Í nógvum feløgum hava bátarnir í mong ár verið flotaðir flaggdagin, og so hevur verið drivið á inntil á ólavsøku.

Nú er hetta søga í nógvum feløgum. Eitt dømi um hetta er í Klaksvík, har tey fóru undir fyrstu venjingarnar tíðliga á árinum. Felagið keypti í vetur tríggjar rógvimaskinur. Tær fingu toyggið vetrarmánaðirnar, og tá tað var liðið eitt sindur út, vórðu gomlu bátarnir flotaðir. Síðst í apríl vóru nýggju bátarnir klárir, og síðani tá eru teir vornir partur av býarmyndini.

Fyrstu lønina fyri nógvu venjingina fingu kvinnurnar umborð á Páll Fanga leygardagin:

– Venjingarstøðan er væl betur, enn hon hevur verið undanfarin ár. Vit hugsaðu um Jarnbard og Sølmund, og tað var virkuliga deiligt, at vit fingu ein góðan start. Stýrimaðurin hjá okkum segði nokk so skjótt, at vit høvdu fingið Jarnbard afturum okkum. Tá tú fært kappingarneytarnar afturum, kennist tað, sum um tað verður lættari at rógva.

Hetta sigur Beinta Klakkstein. Hon er nevndarlimur í Klaksvíkar Róðrarfelag og ein av manningini umborð á Páll Fanga. Tær vita, hvat tað er at rógva kapp. Manningin er ímillum 19 og 24 ár, og tær vóru allar við Páll Fanga í fjør. Tá vóru tær onkra ferðina nummar tvey og trý, men í samlaða roknskapinum endaðu tær á fimta plássi.

Tríggjar tær næstu vikurnar hugsa fleiri av Páll Fanga kvinnunum bara um venjing og bøkur. Tær stríðast við prøvtøkurnar á HF skeiðnum í Klaksvík. Munnligu prøvtøkurnar hjá HFarunm eru nógvar, so tær hava ikki stundir at spáka aftur og fram og so at siga sóla sær í norðoyarstevnu sigrinum.

Umborð á Páll Fanga er Solby Eliasen stýrimaður. Á lærinum eru Beinta Klakkstein og Anna Mohr. Í rúminum sita Olevina Jacobsen og Rósa Petersen, og Rannvá Dahl og Rannvá Jacobsen sita á toftini.

Spildurnýggjur

Páll Fangi var leysur av hinum bátunum, tá hann kom á mál. Sølmundur, sum eisini er nýggjur bátur, hevði góðan start. Hann var næstur á mál, men kappingin við Víking var stór.

Jarnbardur datt eina bátslongd afturum, tá málið var hálvrógvið, og hann megnaði ikki at koma afturíaftur.

Ein spildurnýggjur bátur var við í kappingini. Fortuna hjá vestmenningum hevði ongantíð flotið, tá teir komu til Klaksvíkar við henni. Hesa ferð endaði nýggi vestmannabáturin næstaftast, men tað kann væl hugsast, at vestmannakvinnur fara at gera um seg á øðrum stevnum. Men tað skal nógv til fyri at taka Páll Fanga. So mikið sást á norðoyarstevnuni.

Fípan Fagra aftur til heiður og æru

5–mannafør gentur: Í fyrraárið vóru tær framvið, og nú tykist tað, sum um tær av álvara ætla at gera seg galdandi

Tað var tann tíð, tá Fípan Fagra úr Klaksvík gjørdi um seg í kappróðrinum. Frá 1964 og fram til 1972 var kappast um FM heitið í einum róðri fyrst í august. Ofta vóru kappingarnar á Skálafjørðinum. Dreingirnir á Fípuni Føgru vunnu fyrsta árið – í 1964, og genturnar vunnu fýra ferðir: í 1965, 1966, 1967 og í 1969.

Síðani tá hevur lítið verið at hoyrt til Fípuna Føgru. Besta úrslitið fingu tær í 1999, tá tær vunnu bronsu í FM kappingini. Í fjør gekk einki serligt, men nú tykist tað av álvara at vera farið at gangu undan.

Genturnar við Fípuni Føgru vunnu næstsíðsta vikuskifti á Strondum, og – í hvussu so er sum tað er okkum kunnugt – eydnaðist tað leygardagin fyri fyrstu ferð nakrantíð at fáa sjey stig í einum FM róðri.

Spenningurin var stórur, og genturnar í Klaksvík megnaðu at liva upp til tað, sum viðhaldsfólkini høvdu vónað og kanska roknað við.

– Tað gekk akkurát, sum tað skuldi. Vit fingu ein fínan start, og vit kendu tað sum um vit vóru ímillum tær fremstu beinanvegin. Stýrimaðurin hjá okkum segði, at vit lógu væl fyri, og vit megnaðu næstan allan vegin at halda ferðina, sum vit høvdu ætlað.

Tað sigur Heidi Joensen, sum er bátsformaður umborð á Fípuni Føgru.

Tú sigur næstan allan vegin?

– Ja, kanska kundi endaspurturin eydnast eitt sindur betur, enn hann gjørdi, men vit hava alla orsøk til at vera væl nøgdar.

Bátsformaðurin sigur tað ikki sjálv, men tað ber væl til at ímynda sær, at tað hevur verið eitt sindur torført hjá klaksvíksgentum at leggja alla orku í endaspurtin, tá tær lógu so væl fyri. Á málinum vóru tær gott og væl leysar av næstfremsta bátinum, sum var Sílið. 5–mannafarið hjá Havnar Róðrarfelag er nýtt. Tað er Magni Nielsen, sum hevur smíðað

Hvussu var hesin róðurin, tá tit sammeta við tann á Strondum?

– Ta ferðina var Sílið ikki við. Tjaldrið endaði næstfremst, og á norðoyarstevnu hugdu vit mest eftir hesum báðum bátunum, men tað var eitt sindur torført, tí Sílið var vestast, og Tjaldrið var eystast, meðan við vóru nummar fýra eystanífrá.. Líkindini á Strondum vóru ikki so góð, sum tey vóru leygardagin, og so spældi tað eisini inn, at vit ikki høvdu okkara egna stýrimann við á Strondum. Tá lærtu vit stýrimannin av Jarnbardi.

Nógvar royndir

Omanfyri hava vit tosað um gentumanningina umborð á Fípuni Føgru. Talan er um gentubát, men rógvararnir eru í búnum aldri, og við einum undantaki hava tær nógvar royndir í kappróðri. Tær eru ímillum 18 og 23 ára gamlar. Eingin teirra róði í fjør, men í fyrraárið vóru tær við til at vinna bronsumerkini.

Í ár fóru tær undir venjingina fyrst í mars, og síðani sunnudagin 29. apríl, tá nýggju bátarnir í Klaksvík vórðu flotaðir, hava tær vant stútt og støðugt. Venjingarætlanin sigur, at tær skulu venja tríggjar dagar og so halda frí ein dag, og tað hava tær gjørt.

Umborð á Fípuni Føgru er Sonja Andreassen stýrimaður. Á lærinum eru Jórun Høgnesen og Maria Torgarðsson. Í rúminum eru Selma Høgnesen og Gunnvør Joensen, og á toftini sita Heidi Joensen og Rúna Simonsen.